

# Aftur eitt útlendskt frálandsskip á Havnini

Deil:


Jan Müller


09.01.2015 - 18:39

Oljan.fo

Ikki færri enn fýra útlendsk frálandsskip koma á Havnina í januar fyri at skifta manning og keypa vørur og tænastur av ymsum slag. Fyrsta skipið, Vos Hades, kom á Havnina fyrr í vikuni, og í dag liggur næsta frálandsskipið á Havnini. Tað er Vos Westwind, sum er í somu ørindum sum tað fyrsta skipið. 12. januar kemur triðja skipið Vos Raasay á Havnina og 15. januar Vos Fabules. Umframt at skifta manning, bunkra fleiri av skipunum og fáa proviant og aðrar vørur.

Tað er Faroe Ship, sum er agentur fyri hálendska Vroon reiðarríið, ið eigur øll skipini. Talan er um standbyskip, sum arbeiða fyri oljufeløg eystan fyri føroyska markið. Í hesum

førinum eru skipini komin til Føroya at skifta manning, tí fyri at kunna lúka ávís krøv í skattalógini, mugu tey í aðra útlendska havn eina ferð um árið. Vanliga brúka tey havnina í Lervick.

Tað er annars ikki óvanligt, at útlendsk frálandsskip koma í føroyska havn at skifta manning og fáa ymsar tænastur. Hetta hevur serstakliga vundið nógv uppá seg, tá virksemi vestan fyri Hetland hevur verið nógv.

Bæði føroyskar havnir og fyritøkur hava seinastu árini gjørt eitt stórt arbeiði fyri at kunna oljufeløgini og feløg í oljuvinnuni um møguleikarnar at koma til Føroya at keypa tænastur av ymsum slag. Teinurin til Føroya er oftani nógv stytri enn tann til Hetlands ella Skotlands. Og sum skilst eru útlendsku fyritøkurnar, sum eiga ella leiga skipini, sera fegnar um føroysku tænasturnar.

Tað vakti serstakan ans, tá tað eydnaðist at fáa ein av heimsins størstu boripallum á Skálafjørðin at verða umvældan. Nakað eftir tað kom fyrsta bláa tangaskipið hjá Maersk reiðaríinum nakantíð til Føroya at verða umvælt.